# ÍF Føroyar í aðru deild

*Flogbóltur: Við sigrinum á VKV Gladsaxe um vikuskiftið, kundu ÍF Føroyar leikararnir lata sjampan-jupropparnar bresta úr fløskuni. Við sigrinum var uppflytingin veruleiki*

Sveinur Tróndarson

Føroyska ítróttarfelagið í Keypmannahavn hevur í fleiri ár gjørt seg galdandi í fótbólti, men sum vit greiddu frá í farnu viku, eru teir eisini farnir at gera seg galdandi í flogbólti.

Eftir eina torføra byrjan upp á hetta kappingarárið, kom vend í, tá árið var hálvrunnið og síðani hevur bara gingið framestir. Hermann Lindberg fekk ungu menninar at taka seg so mikið saman, at teir eru farnir at leika skilagóðan flogbólt. So skilagóðan, at teir um vikuskiftið kundu tryggjað sær uppflyting í hægri deild.

Og tað eydnaðist.

ÍF Føroyar spældi um vikuskiftið móti VKV Gladsaxe og tann dystin vunnu teir 2-0.

Við sigrinum eru teir framhaldandi á fjórða plássi, men nú ájavnir við liðið, sum er nummar trý. Tað liðið hevur kortini leikt ein dyst fleiri enn føroyingarnir, so í veruleikanum er møguleiki fyri, at ÍF Føroyar gerst nummar trý tá avtornar.

Nú er so eingin møguleiki hjá hinum liðunum at fáa ÍF Føroyar aftur, og tískil kemur føroyska liðið at leika í aðru deild næsta kappingarár. Sosialurin ynskir ÍF Føroyar tillukku við góða úrslitinum og góða eydnu næsta kappingarár

# ÍF-Fleyr avlýstur

*Flogbóltur: Dysturin millum ÍF og Fleyr í meistaradeildini hjá kvinnum varð avlýstu*

Sveinur Tróndarson

Sambært skránni skuldu ÍF og Fleyr leika dyst á Kambsdali leygardagin, men av ymsum ávum varð hesin dysturin av ongum.

Dráttur, sum átti at døma dystin, hevði mistikiðå seg, og tí høvdu tær ongan dómara sent til Fuglafjarðar. Kortini eydnaðist liðunum at finna ein annan dómara, men tá hesin møtti, bar Fleyr seg undan at spæla dystin, tí ein av teirra leikarum hevði fingið skaða.

Møtti dómarin skrivaði kortini ein dómaraseðil fyri dystin og sendi Flogbóltssambandinum hann við frágreiðing um tilburðin.

Sosialurin tosaði við kappingarstjóran hjá Flogbóltssambandinum sunnukvøldið, og hann segði, at FBF ikki hevði tikið støðu til henda dystin enn.

»Tað er sera óheppið, at slíkt hendir, men nú mugu vit síggja frágreiðingina frá dómara og liðunum áðrenn vit taka støðu«, sigur Trygvi Poulsen.

Flogbóltssambandið skuldi hava fund um málið í gjárkvøldið.

Sum vit hava skilt er eitt sindur av tvídrátti í uppfatanini hjá liðunum báðum, sum ger, at tað ikki er bara sum at siga tað at taka støðu í málinum.

Fyri Fleyr er málið sera óheppið, tí fyri nøkrum vikum síðani møtti liðið ikki til dyst móti TB. Tá var sjúka orsøkin. Hesaferð vóru tær á staðnum við seks leikarum, men tá tann eini fær skaða, ber ikki til at manna lið, og so ber hedur ikki til at spæla.

Hvør avgerðin var, vita vit sjalvsagt ikki, men vinnur ÍF, so smoyggja tær sær framum Fleyr í stigatalvuni og lata havnarkvinnum síðstaplássi í kappingini.

# Dráttur vann í Trongisvági

*Flogbóltur: Dráttur vann dystin móti TB í Trongisvági sunnudagin og nú eru liðini púra jøvn í kappingini um annað plássi í landskappingini hjá kvinnum*

Sveinur Tróndarson

TB-Dráttur 1-2



Tað var dramatikkur í høllini í Trongisvági sunnudagin. TB hevði fingið vitjan av Drátti, sum skuldi vinna dystin um tær skulu gera sær vónir um at røkka øðrum plássi í meistaradeildini hjá kvinnum og tað eydnaðist.

Dráttur vann dystin 2-1 og sum vit hava skilt, so var tað uppiborið.

**Helga spældi væl**

Tað hevur ongantíð verið nakar ivi um, at Dráttur tá tær hava havt alt fólkið tókt, saktans kundi fingið meira burtur úr landskappingini enn tær hava fingið. Tá kappingarárið er av, eru tað altíð tær, sum hava drigið tað stytsta stráið og sum oftast hava tær sjálvar verið orsøkin.

Tær tapa teir dystirnar móti liðum, sum eru niðanfyri tær í stigatalvuni og tað ger uppgávuna torførari enn neyðugt.

Árið í ár er einki undantak í so máta, tí m. a. hava tær tapt ein dyst móti ÍF, sum tær áttu at vunnið, tá hugsað verður um royndirnar í ovastu kvinnudeildini. Kortini hava tær megnað at koma eitt sindur afturíaftur í ár, um enn tað kann tykjast torført hjá teimum at vinna silvurið, tí seinasti dysturin er móti meistarunum úr Mjølnir.

Men, tað skuldi ikki undrað, at Dráttur enn einaferð kann spíla seg út og fáa eitt gott úrslit.

Sunnudagin megnaðu tær tað á útivølli og sum sagt var tað uppiborið eisini.

Sum vit hava skilt var ein høvuðsorsøkin, at Helga Nordendal spældi sum ein brandur á miðjuni. TB hevði eingi mótvápn tá Helga fór í álop og tað gjørdi arbeiðsumstøðurnar frægari.

Harafturat var Miriam við aftur hjá Drátti og hóast hon ikki er í so góðari venjing, so hava hennara royndir sera nógv at siga á vøllinum.

Um tað so er nóg mikið til at røkka silvrinum, tora vit ikki at meta um í løtuni.

**TB í trupulleikum**

Hjá TB var sunnudagurin harafturímóti einki at reypa av.

Tað kann sigast so einfalt, at tær hetta vikuskiftið taptu tann skeiva dystin. Høvdu tær tapt móti Fleyr og vunnið á Drátti, so var kappingin avgjørd, men soleiðis skuldi ikki vera.

Spælið hjá TB var ikki nóg gott sunnudagin og tí kláraðu tær ikki at gera nakað við Drátt, sum vóru munandi meira vandamiklar í álopinum enn heimaliðið. Og tað er eftir øllum at døma nakað, sum hevur ónøgd við sær á heimaliðnum.

Í kappingini um silvuri stendur TB tó við teimum bestu kortunum. Tær hava eins og kappingarneytarnir úr Vágum ein dyst eftir og er hann móti ÍF, sum í løtuni liggur niðast í deildini. Tí mugu vit siga, at TB framhaldandi er favorittur til silvurið, um enn tær als ikki skulu vera vísar í at vinna á ÍF, sum saktans kann gera ovaru liðunum lívið súrt.

Og tapa tær, so ræður í hvussu er um at fáa ein hálvleik til høldar, so at tær hava betra settmunin tá gjørt verður upp. Støðan er nevniliga tann í løtuni, at liðini standa fullkomiliga á jøvnum, bæði hvat viðvíkur stigum og settmuni.

Men fríggjakvøldið eru vit munandi klókari ...

# Fram misti týdningarmikið stig

*Flogbóltur: Fram misti eitt týdningarmikið stig á vegnum móti silvrinum, sum nú tykist á veg til Klaksvíkar*

Sveinur Tróndarson

Fram-Fleyr 0-2

Fram tapti dystin móti Fleyr og misti við ósigrinum eitt týdningarmikið stig í kappingini um annaðplássið í meistaradeildini hjá monnum. Dysturin endaði við greiðum 2-0 sigri til Fleyr, sum enn er ósigrað í ár.

**Silvurið til Klaksvíkar**

Dysturin um vikuskiftið hevði rættuliga stóran týdning í kappingini um annað plássi í meistaradeildini hjá monnum, tí Fram hevur bara tann eina dystin eftir í ár, meðan Mjølnir hevur tveir.

Sum støðan nú er vorðin kann Fram í allarbesta føri endað ájavnt í stigum við Mjølnir, men tað eru ring sannlíkindi fyri. Mjølnir hevur nevniliga ein dyst eftir móti SÍ og ein móti Fleyr, og vinna teir annan dystin, so gerast teir nummar tvey í kappingini.

Og tað skal ikki vera nøkur loyna, at vit avgjørt vænta, at Mjølnir vinnur á SÍ, sum í seinastuni hevur havt meiri enn trupult at fóta sær í bestu deildini. Synd, men ein veruleiki, sum vit bara mugu staðfesta nú kappingin er um at vera av.

**Einki at gera**

Við Fleyr hevur tað verið soleiðis, at tað higartil í ár ikki hevur verið nakar, sum hevur kunnað skala teimum. Teir hava verið so nógv tað besta liðið í deildini og tað er fult uppiborið, at teir hava vunnið allar dystirnar í hesum kappingarárinum.

Gamaní hava teir tapt onkran hálvleik, men tað er so verri enn so, at teir hava staðið til at tapt ein heilan dyst. Einasta liðið, sum í veruleikanum hevur kunnað hótt teir er Mjølnir, og teir hava so tveir møguleikar enn at basa havnarmonnum. Ein í landskappingini og so í steypafinaluni.

Tað er lítið at ivast í, at klaksvíkingarnir ætla sær steypasigurin, men tað er eitt ivamál, um teir hava breiddina til tað. Styrkin hjá Fleyr hevur júst verið breiddin á liðnum, sum hevur gjørt, at teir hava eitt sera gott álop á øllum plássum. Harafturat eru menn, sum uttan trupulleikar kunnu leika á fleiri plássum, og tað gera bara liðið enn betri.

Mjølnir hóttir teir, um enn ikki við somu breidd, so við einstøkum leikarum, sum eru framúr góðir. Tað kann vera nóg mikið til sigurin, men so skal so at siga alt ganga til teirra fyrimun. Um tað fer at eydnast, fáa vit at síggja.



# Nú er SÍ niðast

*Flogbóltur: Tað eydnaðist ÍF at basa sørvingum og nú hava liðini býtt um pláss í meistaradeildini hjá monnum*



Sveinur Tróndarson

ÍF-SÍ 2-0

Tað eydnaðist ÍF at vinna dystin móti sørvingum á Kambsdali leygardagin og við sigrinum hava liðini býtt um pláss í meistaradeildini.

Talan var ikki um nakran stóran dyst, men tað eru fuglfirðingar líkagladir við, tí kappingarárið er nú um at vera av og tað sær út til, at støðan, sum hon er nú, verður endastøðan.

**Illa mannaðir**

Sørvingarnir vóru, sum skilst, ikki væl fyri, tá teir komu til Fuglafjarðar. Liðið teir møttu við var ikki tað sterkasta, sum teir kunnu seta saman og úrslitið varð hareftir.

Hjá ÍF var lítið mætari. Eisini teir høvdu skravað tað saman, sum kundi finnast, men hjá teimum vísti tað seg at vera nóg mikið til at vinna dystin.

Bjarni Joensen, veteranur hjá ÍF sigur, at spælið var ikki nakað at reypa av, men ÍF var betra liðið allan vegin ígjøgnum.

»Tað var uppiborið, at vit vunnu dystin, haldi eg« sigur hann »og tað var ikki so galið, at kunnu sníkja seg fram um teir í stigatalvuni«.

Og nú kann hann við góðari samvitsku seta skógvarnar á hylluna.

**Bróta úr nýggjum**

Bjarni Joensen er ikki nakar nýggjur maður í føroyskum flogbólti, minni enn so. Fyri nógvum árum síðani varð hann við Mjølnir, men tá hann flutti til Fuglafjarðar at búgva, fór hann at spæla við ÍF. Seinasta ár, gjørdist hann meistari við ÍF, og nú heldur hann tíðina verða komna til at seta skógvarnar frá sær og lata aðrar sleppa framat.

»Tí var tað gott, at vit sluppu av niðasta plássinum«, sigur Bjarni Joensen »tað hevði ikki verið nakað serligt, at enda karrieruna við einum síðstaplássi«.

Hóast Bjarni væntar, at fáa fleiri dystir í bestu deildini, so ætlar hann sær í staðin at hjálpa teimum yngru spælarunum at byggja eitt nýtt lið upp.

»Vit hava tilfar í felagnum, men tað tekur tíð, at gera eitt gott lið burtur úr tí. Leggja vit okkum eftir at byggja tað upp, so kann ÍF aftur hava eitt gott lið um eini fýra fimm ár, og eg haldi, at tað er tað rætta at gera«, sigur Bjarni Joensen.

# Juana og Bárður vunnu

*Flogbóltur: Flestu føroysku flogbóltsútisetar í bestu donsku deildini spældu um vikuskiftið og hjá Juanu og Bárði bragdaði*

Sveinur Tróndarson

Mansliðið hjá Fortuna Odense leikti um vikuskiftið móti Roskilde og tað eydnaðist Bárði B. Mikkelsen og hinum Fortuna monnunum at vinna dystin 2-1.

Úrslitið í sær sjálvum kom ikki sum tað stóra sjokkið, men tað var meira mátin dysturin varð vunnin upp á, sum er meiri at kalla skemtiligur. Fortuna hevði einans sjey mans til dystin fús og av teimum vóru tveir spælskiparar og ein libero.

Tì valdi venjarin at seta Bárð B. Mikkelsen út á kantin at spæla og hóast Bárður ongantíð áður – heldur ikki heima í Føroyum – hevur spælt á kantinum, so gekk tað strúkandi. Sigurin var til høldar fingin og tvey stig í posan í kappingini um einki!

**Juana vann føroyska dystin**

Av tí at kvinnuliðið hjá Fortuna Odense skal spæla í kvøld høvdu tær frí í dag, men tað forðaði kortini ikki fyri, at hinar tríggjar føroysku dámurnar spældu.

Alvilda og Annika høvdu nevniliga vitjan av ASV Århus,. sum Juana Joensen, úr TB, er farin at spæla við og tann dysturin endaði við sigri til Juanu.

Tær vunnu dystin 2-1 og eru ósigraðar í endaspælinum. Tær kunnu tó ikki brúka tað til stórvegis, tí tær eru ikki millum fýra tey bestu liðini og spæla bara fyri æruna. Einki lið flytir niður í ár.

**Útflutningur av Tvøroyri**

Gløgga eygað hevur kanska langt síðani sæð tað, men kortini fara vit at vísa á, at nú eru tveir leikarar í ovastu donsku kvinnudeildini, sum koma úr TB.

Seinasta ár leiktu Gudrid Nolsøe og Juana Joensen báðar við TB og nú hava báðar fingið sess á liðum í bestu donsku flogbóltsdeildini.

Hetta sigur ikki so lítið um góðskuna í føroyskum flogbólti sum heilt, og er avgjørt eitt stórt herðaklapp til tað arbeiði, sum lagt hevur verið í flogbóltin á Tvøroyri seinastu árini. Hetta vísir, at tað er stríðið´vert, tí leikararnir eru so góðir, at teir klára seg í ovastu deildini í Danmark.

Samstundis vísir hetta eisini tann miss, sum TB hevur verið fyri til hetta kappingarárið. Tí er tað – hvussu enn umstøðurnar eru á Tvøroyri í løtuni – rós vert, at tær hava klárað at halda seg í oddinum í kappingini í ár.

# TB vann rótutan dyst

*Flogbóltur: Fleyr var farið um Suðuroyarfjørð fríggjakvøldið, men tær komu aftur sum av torvheiðum. TB vann dystin, sum er mettur sum tann vánaligasti í høllini í Trongisvági nakrantíð*

Sveinur Tróndarson

Fleyr-TB 0-2 (Leiktur í Trongisvági)

Tað var lítið veiggj í flogbóltinum, sum varð leiktur í høllini í Trongisvági fríggjakvøldið.

TB og Fleyr leiktu sínámillum dyst, sum sambært skránni átti at verið leiktur í Havn, men sum var fluttur til Trongisvágs, av tí at Fleyr ikki møtti til dyst móti TB fyrr í ár.

**Einki høpi í**

Av Tvøroyri hava vit frætt, at tað var púra einki høpi í dystinum. Hvørki av liðunum megnaðu at fáa skil á spælinum so mikið, at tað gjørdist talan um ein líkinda flogbóltsdyst.

Sum vit hava skilt eydnaðist tað ongantíð liðunum at fáa nakað skipað álopsspæl og hóast TB vann dystin greitt, so var tað ikki tí, at tær spældu serliga væl.

Alt ov nógvar persónligar villur gjørdu dystin til ein tann vánaligasta dyst í høllini í Trongisvági í fleiri harrans ár, verður sagt av Tvøroyri.

Einasta positiva, sum tvøråkvinnur fingu burtur úr dystinum vóru tey tvey stigini, sum sigurin gav teimum.

**Illa fyri**

Hjá Fleyr var støðan vánalig. Liðið var illa mannað og hóast tær høvdu sjey leikarar við sær um Suðuroyarfjørð, so var liðið ov illa samanspælt til at kunna hótta TB. Onkrir heilt ungir leikarar vóru eisini við á liðnum, og hóast ósigurin, so er tað kanska tað mest positiva við dystinum, at yngri leikarar sleppa at føla hvussu tað er at leika í meistaradeildini.

Hesum hevur Fleyr brúk fyri, tí árið í ár hevur ikki verið annað enn ein stórur niðurtúrur.

Kortini eru tvøráfólk als ikki nøgd við mátan, sum TB vann dystin uppá, tí tey halda, at TB átti at kunna gjørt sær dælt av, at Fleyr var so illa mannað.

Hetta eydnaðist sum skilst ongantíð, men kortini eydnaðist teimum at fáa sigurin til høldar.

Tað var tað týdningarmiklasta tá samanumkom.



# Mjølnir slapp ikki um Leirvíksfjørð

*Flogbóltur: Av tí at Dúgvan avlýsti ein túr, slapp Mjølnir ikki um Leirvíksfjørðå og tí mátti dysturin í Vágum fríggjakvøldið útsetast*

Sveinur Tróndarson

Mjølnir skuldi vestur í Vágar at spæla móti Drátti um vikuskiftið, men tað varð av ongum. Tá klaksvíkskvinnur skuldu um Leirvíksfjørð seinnapartin fríggjadagin legði Dúgvan stilt og tí mátti dysturin í Vágum útsetast til í hesi vikuni ístaðin.

Marjun Kalsø, liðskipari hjá Mjølnir greiðir frá, at tær høvdu leigað buss úr Leirvík til Vestmanna tí eingin annar fartur var, men tá Dúgvan avlýsti túrin klokkan 16.10, so vórðu tær ov seinar til bátin um Vestmannasund.

»Nú vóru vit fyrireikaðar og tí var tað serstakliga óheppið, men tað gerst ikki við. Vit spæla dystin fríggjakvøldið í staðin, so tað er ikki verri enn so«, sigur hon.

Vinnur Dráttur dystin er kappingin um annaðplássi í meistaradeildini hjá kvinnum víðopið, men tapir Dráttur, so er næstan vist, at TB fer við silvurinum.

Sum støðan er í løtuni eru liðini púra jøvn. Bæði í stigum og í settmuni.